MÁLTEIGURIN

Tann og hin

Onkur hevði undrast, um vit høvdu lisið í einari danskari avís, at »han ikke kunne komme, *thi* han var syg«. Tað eitur *fordi* á nútíðardonskum. Orðini, kona, dama, kvinna, kvendi, frúa, teys, madamma, fjóð, sprund, fesj og rippa hoyra til hvørt sítt stíllag og/ella hvørt til sína tíð. Verða sovorðin ord brúkt hvørt um annað, so er í besta føri talan um anakronismu ella stílarmóð, í ringasta føri um nútíðar málpolitikk.

Í fylgiblaðnum hjá Dimmalætting »Úr luftini« fyri fríggjadagin tann 30. mai verður 'hin' fleiri ferðir brúkt sum bundið kenniord í staðin fyri 'tann', sum tað av røttum eitur. Rætt er, at 'hin' fyrr hevur verið brúkt sum kenniord, men tað er langt síðan avloyst av 'tann'.

Í grammatikkini kalla vit tað binding (determinering), tá ið vit gera eitt navnord bundið (hús-húsið). Og tað gera vit á føroyskum, íslendskum, donskum, svenskum og norskum við ending; vit hava eftirhongt bundið kenniord: maður-in; mand-en; mann-en. Men á eingilskum, týskum, fronskum, sponskum og øðrum málum gera vit navnord bundin við at seta tað bundna kenniordið frammanfyri: the man, der Mann, l'homme, el hombre.

So vítt so gott. Men so er tað tað, at summi mál hava *tvíbinding* (dupultdeterminering). Tey hava, oftast tá ið lýsingarord er framman fyri navnorðinum, bæði bundið kenniord og bindandi ending. Hesin grammatiski spesialiteturin finst í norskum, svenskum og føroyskum (den lange krigen, det långa kriget, tað langa kríggið). Hendan tvíbindingin er so vanlig í sambandi við lýsingarord, at onkur kallar hetta kenniordið fyri *adjektivartikel (»lýsingarkenniord«)*.

Vit kunnu siga, at tvíbindingarskipanin er bundið kenniord + lýsingarord + navnord. Men uttan fyri hetta systemið hava vit ein hóp av møguleikum við og uttan bundið ella óbundið kenniord, og har eru variantarnir sera týdningsberandi: ein kona fær mann, men hon missir *mannin;* tey høvdu kúgv, men hann rendi á *eina kúgv.* Og tá ið tann neyðar kúgvin er deyð, so er hon *tann deyða kúgvin* og ikki *hin deyða kúgvin,* tí so hevði verið talan um eina aðra deyða kúgv, og so hevði, reint matematiskt, tann vánaligi bilførarin havt rent á tvær kýr. Tann kann eisini vera ávísingarfornavn og hevur tá herðing: *Tann* maðurin, ið har stendur…

'Hin' er ikki kenniord, men ávísingarfornavn (demonstrativt pronomen). Leivdir av fornum bróki finnast í steinrunnum formum sum hin óndi, hin versti, Høgni hin gamli, hin ráðni, nú hinir gomlu. Vit kunnu eisini í poetiskum stíli siga hin heilagi bardagin og hin sæli morgun. Í kvæðum hava vit stundum bæði tann og hin: tann hin reysta svein.

'Hin' eitur á donskum 'den anden', á eingilskum 'the other', á týskum 'der andere'. Um vit nú umseta yvirskrivtirnar í »Úr luftini« til t.d. danskt, so fáa vit: Hin loyniliga rutan = Den anden hemmelige rute; Hin rætti McCoy = Den anden rigtige Mc Coy; Hin svarti kassin = Den anden sorte kasse. Men hetta gevur onga meining. Tað skuldi sjálvsagt verið *Tann loyniliga rutan* osfr. Ella óbundið: *Loynilig ruta.* Tann óbundni formurin virkar ofta lættari enn tann tvíbundni - men tað er aftur eitt spursmál um stílfølilsi og samanhang. Umráðandi er bara ikki at blanda tann og hin saman, tí tey hava heilt ymiskar uppgávur at røkja í nútíðarføroyskum. Tann er tað bundna kenniordið, og hin er eitt ávísingarfornavn júst sum hesin og hasin og hetta og hatta. Tí er talan um rætt valt ávísingarfornavn, tá ið Elis sigur (tá ið onkur er omandottin): Hygg hatta raska!

n



© BES, 1997

KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: STATIONCAR

L	A	S	A	R	A	P	I	S	T	Ó	L	I	R		K
U	N	I	T	A		L	N		Ó	P			E	V	A
N	I	L	A	D	M	I	R	A	R	E		I	K		R
D		D		A			I			C	A	R	U	S	O
A	S		I	R	A	K		A	L			C	A	M	U	S
H	E	K	K	S	P	O	I	L	A	R	A			M	S
O	R	V		C	I	T	R	U	S		P	A	L	M	A
L	V		F	A	S		A	E	T	U	R	S	V	A	R
A	O		R	N			E	A		I	T		R	Í
118	S	T	E	N		P	Á	L	L		C	M		D	L
S	T	A	K	A	R			G	Ó		C	A		E	I
L	Ý	Ð	A	R		K	R	A	K	K	I		Ø	K	T
A	R	A		I	L	L	A		A	R	O	N		K	I
T	I		C		L	E	S		N	I		J	A		R
U	N	D	I	R		I	K	E		P	R	Á	T	A	
R	G		F	R	O	N	T	S	P	O	I	L	A	R	I

Hvønn loygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. …«** á bjálvan.

Vinnari: Beinta L. Rasmussen, á Frælsinum 8, 100 Tórshavn

Loysunarorð: **119**

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Bíblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.

HIN FØROYSKI NORRØNI EFTIRSKULIN
Påkærvej 3 - Hygum
7620 Lemvig
Tlf. 0 97 83 61 00
Fax 0 97 83 60 56

Vit hava OPIÐ
hóskvøld:
frá kl. 17.00–24.00
fríggjakvøld:
frá kl. 17.00–03.30
leygarkvøld:
frá kl. 17.00–03.30
sunnukvøld:
frá kl. 17.00–24.00
Casablanca Night Club
Tórsgøta 11 • 100 Tórshavn
Tlf. 19696